Størv í Føroya Banka



## 3 íløguráðgevarar til Føroya Banka

Íløguvirksemið í Føroya Banka er økt munandi seinastu árini. Vit leita tí eftir ráðgevum til framhaldandi menningina av íløguøkinum, ið eru hugaðir fyri at veita kundum okkara enn betri ráðgeving innan íløguøkið.

**Arbeiðsøki**
Sum íløguráðgevi við handilsborð bankans fært tú ábyrgdina av at ráðgeva kundum og kundaráðgevum um virðisbrævaíløgur. Hevur tú áræði til at seta teg inn í nýggj virkisøkir, so nýtist tær ikki at hava stóran kunnleika til íløgur, tí vit geva tær góðar møguleikar fyri at menna tína vitan um virðisbrævaíløgur bæði í bankanum og við uttanhýsis skeiðum og/ella útbúgving.

Vit arbeiða við einari miðvísari vakstrarætlan við nógvum nýggjum handilsvirksemi innan íløguøkið.

Tú kemur at arbeiða í einum nýggjum toymi við fleiri nýggjum starvsfeløgum, ið eldhugaðir arbeiða fyri at skapa góð úrslit fyri bankan og kundar okkara. Vit vænta, at tú - saman við teimum - vil gera títt besta fyri at varðveita verandi og draga at tær nýggjar kundar.

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at tú:
- er í holtur við ella hevur viðkomandi útbúgving (peningastovnsútbúgving, HD, cand.merc, cand. oecon ella líknandi)
- er framsøkin, eldhugað/ur og íbirtandi
- er góður toymisleikari
- megnar at arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst
- sær møguleikar og megnar at útinna teir í verki
- er sinnað/ur áhaldandi at menna tínar førleikar

Vit leggja dent á, at tú er før/ur fyri at bera skjótt at í sambandi við marknaðarbroytingar, og at kundarnir verða kunnaðir um átøk, ið taka hædd fyri broyttu marknaðarviðurskiftunum.

**Løn og setanarviðurskiftir**
Verður avtalað nærri sambært útbúgving og royndum umsøkjarans.

**Umsókn**
Send tína umsókn við CV til:
Føroya Banki, Húsagøta 3, FO-100 Tórshavn,
att: Bjarki Mohr, starvsfólkaleiðara ella á teldupost **starvsfolk@foroyabanki.fo**
innan 15. mars 2007.

**Meira kunning**
Er tú áhugað/ur? So fært tú meira at vita um størvini við at seta teg í samband við leiðaran fyri Fíggjardeildini, Johnny Mouritsen á tlf. 216860, teldupostur **johnny.mouritsen@foroyabanki.fo**, ella Bjarka Mohr á tlf. 219212, teldupostur **bjarki.mohr@foroyabanki.fo**.

FØROYA BANKI



### Avbjóðandi leiðarastarv

# Leiðari til deildina í Saltangará

Tryggingarfelagið Føroyar er eitt mennandi arbeiðspláss. Tú kemur at virka í einum spennandi arbeiðsumhvørvi við góðum arbeiðsumstøðum. Tú hevur dagligu ábyrgdina av 8 starvsfólkum, ið taka sær av sølu og kundarøkt í allari Eysturoynni, og tú samstarvar við deildarstjóran á Privatøkinum á deildini í Tórshavn.

Ynskiligt er, at tú hevur góð søluevnir, kundavinarligan atburð, góð samstarvsevni og góð leiðaraevni. Leiðsluroyndir og kunnleiki til tryggingar er ein fyrimunur men ikki ein treyt.

Tað er ógvuliga týðandi fyri okkum, at tú hevur hug at veita ta bestu tænastuna til okkara viðskiftafólk.

Løn og setanartreytir verða ásettar eftir nærri avtalu.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Helga L. Petersen, deildarstjóra, á telefon 345737 ella hlp@trygging.fo.

Umsóknir, ið allar verða viðgjørdar í trúnaði, skulu saman við viðkomandi skjølum vera okkum í hendi innan 15. mars 2007.

Send umsóknina til:
Tryggingarfelagið Føroyar P/F
Starvsfólkadeildin
Postsmoga 329
FO-110 Tórshavn

Ella send teldupost til:
starvsfolkadeild@trygging.fo

Kongabrúgvin, Postboks 329, 110 Tórshavn
Tel 345600, Fax 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari